## » Eg tímdi ikki bara at spæla fótbólt, og fór tí at rógva

## » Leygardagin vóna vit so at vinna




**GOTT ÚRSLIT**

*Ørnin í tungum sjógvi í Vestmanna seinasta leygardag. Sama ger – tær gjørdust nr. 4, men ætla nú at gerast nr. 1 leygardagin. Tá sigur hann eisini frá betri veðri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## NR.4

Tað hevur gingið heldur misjavnt hjá gentunum umborð á Ørnini higartil í summar. Á norðoyastevnu gjørdust tær nr. 7, men mannaðu seg so upp á sundalagsstevnuni, tá tær gjørdust nr. 5. Vikuskiftið eftir, á eystanstevnu otaðu tær seg enn longur fram, og fingu tá eitt 3. pláss, og eitt 4. pláss á jóansøku. Leygardagin vóru tær aftur í eldinum í Vestmanna, og gjørdust tær tá nr. 4 Tær eru nú nr. 5 hjá 5-mannaførum gentum við 17 stigum, ájavnt við Tjaldrið.

# Eitt 50 ára minni

Í summar eru 50 ár liðin síðani hesi fóru í 1. flokk í gamla skúla í Miðvági ein summardag í 1960.



***Standandi f.v.:*** *Hans Eli Hansen, Mogens Heinesen, Sámal Jákup Jørgensen, Arnfinn Joensen, Rudolf Jørgensen, Jens Erik Magnussen, Jón Eirik Joensen, Neinbjørn Nattestad, Harald Joensen, Dánjal Jákup Jørgensen, Torfinn Jacobsen, Regin Frederiksen og Thomas Juul Thomassen.* ***Sitandi f.v.:*** *Arndis Svabo, Pola Poulsen, Fríðbjørg Niclasen, Jóna Niclasen, Hallgerð Eiriksstein, Kitty Thomsen, Jastrid Joensen og Hansina Hansen.*

*Myndaánari: Torfinn Jacobsen*